# 1900 innkeyparar vitjaðu Vørumessu

**Partafelagið Poul Michelsen gjørdu eina westernstyle framsýning og vunnu kappingina um vakrasta bás á einari Vørumessu, sum aftur í ár eydnaðist væl**

VØRUMESSA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*



Færri og færri vøruprøvar aftur við alsamt betri presentatiónum og meira sannførandi framsýningum. Soleiðis hevur trendurin verið innan fyri handilsstevnur tey seinnu árini, og tann árliga Vørumessan, í ár hildin 10-12. september, var í so máta einki undantak.

Fyriskiparin av Vørumessuni, Birgir Poulsen, er væl nøgdur við tiltakið og tað sama eru heilsølur vit hava tosað við. Keðiligt veður tann seinna dagin minti tó á tær heldur trongligu parkeringar umstøðurnar kring Ítróttarhøllina á Hálsi.

»Skulu vit taka nakað eyðkenni fram frá tiltakinum í ár so vildi eg meint at básarnir vóru flottari enn nakrantíð fyrr,« segði Birgir Poulsen.

»Hetta kann eisini kennast aftur í einum trendi hesi seinastu árini tá tað snýr seg um handilsstevnur í londunum rundan um okkum, nevniliga at nøgdin av vøruprøvum er minkandi meðan dygdin í framsýningum og framløgum yvirhøvur er hækkandi.«

Sum skilst vitjaðu 1900 fólk Messuna, og tað er 100 fólk fleiri enn árið fyri. Samstundis lata framsýnarar væl at úrslitinum.

»Við tí heldur keðiliga veðrinum í huga so haldi eg at 1900 fólk var rættiliga gott. Umstøðurnar til parkering eru ikki tær bestu við høllina, har fyllist skjótt upp, og tá veðrið er illfýsið so kennist tað einki serligt at skula ganga nakran longri tein… Men fólk tóktust kortini nøgd og alt gekk væl.«

Heilsølan Poul Michelsen vann kappingina um ársins vakrasta bás. Básurin, ein western-style framsýning sum minti um ein cowboy bý við einum flottum torgi og øllum møguligum, dróg til sín eitt stórt tal av vitjandi.

»Vit kunnu ikki annað enn lata væl at,« segði Gunnar Mohr, sølustjóri hjá Poul Michelsen. »Okkara framsýning var væl vitjað og úrtøkan sær fyribils út til at vera í lagi, nú áðrenn vit eru liðug at gera upp.«

Poul Michelsen, sum fingu hjálp frá reklamuvirkinum Sansir til at gera básin, vunnu 12 ókeypis framsýningar fermetrar til Vørumessuna næsta ár.

# Sprittkoyrarar skulu gera arbeiði sum annars ikki verður gjørt

**Fólk ið hava forbrotið seg gjøgnum promillukoyring skulu kunna dømast í tvingsilsarbeiði ella í álagda rúsdrekkaviðgerð ístaðin fyri at verða sett í fongsul, meinar Innlendismálaráðið**

LÓG OG RÆTTUR
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*



Innlendismálaráðið fyrireikar broytingar í revsilógini, soleiðis at fólk ið koyra við kenning og aðrir lógarbrótarar skulu kunna verða dømd til tvingsilsarbeiði, ella "samfelagstænastu" sum tað verður nevnt, ístaðin fyri treytaleysa fongsulsrevsing; harafturat verður lagt upp til at dómstólarnir skulu kunna døma treytaða fongsulsrevsing við sertreyt um rúsdrekkaviðgerð.

Sambært upplýsingar frá Innlendismálaráðnum er málið tikið upp eftir áheitan frá Kriminalforsorgini, sum skal hava víst á at royndirnar aðrastaðni hava verið góðar við samfelagstænastu og treytaðari fongsulsrevsing við sertreyt um rúsdrekkaviðgerð.

Tað sum liggur í hesum hugtaki um samfelagstænastu er, sambært eitt skriv frá Innlendismálaráðnum, at rætturin kann áseta at ístaðin fyri at fara í fongsul skal ein persónur kunna dømast til at »arbeiða eitt ávíst tímatal í frítíð sínari« undir eftirliti av Kriminalforsorgini; somuleiðis framgongur at »samfelagstænasta er ólønt.«

Kriminalforsorgin skal finna »hóskandi arbeiði« og arbeiðsplássið skal játta at taka inn tann dømda; somuleiðis skal arbeiðsplássið avgera hvat viðkomandi skal takast við. »Talan er altíð um uppgávur ið annars ikki vórðu loystar,« verður víðari sagt, í undirstriking av at virksemið er »ikki í kapping við lønt arbeiði.«

»Tað er altíð rætturin sum dømir viðkomandi til samfelagstænastu ella til treytaðan dóm við sertreyt um rúsdrekkaviðgerð. Hetta verður gjørt við atliti at eini persónskanning sum kriminalforsorgin ger. Kriminalforsorgin kannar um viðkomandi er egnaður til samfelagstænastu ella um viðkomandi hevur ein viðgerðarkrevjandi rúsdrekkatrupulleika.«

»Samfelagstænasta og treytaður dómur við sertreyt verður tó ikki nýtt tá talan verður um grovari brot, t.d. við persónsskaða, ella um bilurin er stolin. Tá er tað framvegis fongsulsrevsing.«

## Neyvan mótstøðu

Í einum faldara frá Statsfongslinum Nyborg verður greitt frá samfelagstænastu hugtakinum. Faldarin, sum fyrst og fremst vendir sær til brotsfólk, gevur eina heildarmynd av hugtakinum í løttum máli, við praktiskum upplýsingum av ymiskum slag.

»Ístaðin fyri at døma teg til at sita í fongsli kann rætturin avgera at tú skalt arbeiða eitt ávíst tímatal í tínari frítíð millum 40 og 240 tímar,« verður sagt. »Arbeiði tú ikki fært løn fyri.«

»Hvørjir eru tínir fyrimunir við samfelagstænastu?« verður síðani spurt, og svarað: »Tú kemur ikki í fongsul. Tú verður búgvandi heima. Tú kanst framvegis vera saman við tínari familju og vinum og passa títt arbeiði. Tú møtir nýggjum fólkum, og tú fært møguleikan at finna nýggj áhugamál. Aftaná verður tað kanska lættari hjá tær at liva víðari í samfelagnum enn um tú hevði verið í fongsli. Tú rindar eitt sindur aftur til samfelagið upp á ein positivan máta.«

Upp á spurning um hvussu ein persónur kann verða dømdur í samfelagstænastu, svarar faldarin: »Tú skalt verða funnin sekur í einum lógarbroti ið kann revsast við fangilsi. Tú skalt verða við til at sannføra rættin um at tú bæði kanst og vilt útføra samfelagstænastu.«

Og so framvegis.

Enn er eftir at politiskt viðgera tær lógarbroytingar sum skulu til fyri at innføra eina praksis við samfelagstænastu av hesum slag í Føroyum. Tað kann vera torført at ímynda sær at málið fær stórvegis mótstøðu.



# Fangað millum skriðulop

**Fyri Marjuna á Høvdanum Andreasen av Viðareiði skuldi bilturin hjá henni frá Klaksvík til hús sunnumorgunin vísa seg at verða ein lagnutúrur. Herviligt áarføri var, og tað leyp í fleiri gilum fram við vegnum. Marjun rendi á eina grótrúgvu og aftan fyri hana – nakrar fáar metrar burtur – lá ein onnur grótrúgva**

ÓHAPP
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Marjun her avmyndað á staðnum, sum óhappið hendi. Her hava fólk frá Landsverki ruddað rúgvuna burtur frá einum parti á koyribreytini, men tað er ongin ivi um, at rúgvan, sum kom oman á vegin hendan sunnumorgunin, hevur verið stór*

**Leitið:** Klokkan er júst farin av hálvgum fimm sunnumorgunin. 24 ára gamla Marjun á Høvdanum Andreasen er í bili sínum á veg til hús. Hon býr á Viðareiði, og koyrir sum vanligt eftir bygdarvegnum.

Tað er bølamyrkt, og regnið oysir niður uttanfyri. Tað er næstan, sum onkur stendur og spular inn á bilrútin. Marjun koyrir spakuliga, tí hon veit, at við ringum sýni er Viðareiðisvegurin ikki at spæla við. Hon er tó ikki bangin, tí hon er von við at koyra hendan vegin. Ger tað vanliga fleiri ferðir um dagin. Tankin um skriðulop er henni ikki nærri enn vanligt. Viðareiðisfólk hugsa ofta um, at tað kann brádliga leypa, tí tað er hent so ofta fyrr, men tað er ikki ein tanki, sum sleppur at taka yvir hjá teimum.

Tá Marjun er komin niðan gjøgnum Leitisbrekkuna, sum er stutt frá bygdini, byrjar hon at kenna smásteinar undir hjólunum á bilinum. Men hon heldur tó leiðina áfram. Brádliga sær hon eina sera stóra grótrúgvu mitt á vegnum. Hon bremsar, men bremsurnar taka ikki rættiliga við, og tað endar við, at hon rennur upp á rúgvuna. Marjun veit beinanvegin, hvat er á vási. Hóast tað er bølaniða og vánaligt sýni. Omanlop, hugsar hon við sær sjálvari. Fyrst roynir hon at bakka bilin av aftur rúgvuni. Ætlar at royna at sleppa sær burtur, men tað ber ikki til. Bilurin vikast ikki. Seinni vísir tað seg, at tað var gott tað sama, at hon ikki slapp av rúgvuni. Tí tað, sum Marjun ikki veit av, er, at longri niðri á Leitinum leypir eisini, og tí hevði hon bert sloppið nakrar metrar.

Hon byrjar at blíva bangin, men tíbetur hevur hon fartelefon. Eftir einari lítlari løtu hevur hon fingið fatur á pápa sínum og boðað honum frá. Tey gera av, at hon skal sita í bilinum og bíða, til hann kemur eftir henni. Túrurin frá heiminum hjá teimum á Viðareiði til Leitið tekur vanliga onga tíð. Men hesa myrku náttina í øllum regninum og óvissuni, tykist tað sum tímar, meðan hon situr og bíðar.

Púra einsamøll í myrkrinum í sínum vínreyða Peugeot situr hon og lurtar eftir smásteinum, sum raka bilin. Túsund tankar fara í gjøgnum hennara høvur, meðan vatnið fossar tvørtur um vegin og framvið bilinum. Av og á kennist tað sum at bilurin hevur hug at flyta seg, men Marjun sannførir seg sjálva um, at tað bert kennist so, tí hon er bangin.

Pápin kemur so eftir henni, men hann sleppur ikki so nær, tí grótrúgvan er stór og breið. Marjun fer so úr sínum bili og má klúgva upp um rúgvuna, sum menn frá Landsverkinum seinni mettu at vera um tveir metrar til hæddar í støðum. Hon kemur í øllum góðum í bilin hjá pápa sínum. Fingið ein ordans skelk og er á kroppi, men annars ikki fingið nakran skaða. Pápin og hon koyra beint heim, har Marjun tástani kann anda lættliga og gleðast um, at hon slapp væl frá hesum álvarsliga tilburðinum, sum kundi, um illa vildi til, endað nógv verri.

Hon setur ein film frá, tá ein løta er gingin, og tað endar við, at hon sovnar frá honum…



*Tað sá hættisligt út. Bilurin hjá Marjuni á stóru grótrúgvuni á Leitinum. Tíbetur hevði Marjun fartelefon og fekk ringt eftir hjálp*

*Mynd: Norðlýsið*

## Øll ringja

Sunnudagurin kemur, og tað regnar framvegis líka illa. Allastaðni eftir Viðareiðisvegnum eru smærri og størri grótrúgvur, har lopið er í ógvusliga áarførinum. Onkrir menn siga seg ikki vita so ógvusligt áarføri fyrr. Vegurin er stongdur fyri ferðslu, fyri tað fyrsta tí at tað ikki er koyrandi fyri vatni og gróti, men eisini tí at tað framvegis regnar illa.

Marjun er á fótum, og tíðindini um hennara tilburð eru langt síðani farin at ganga. Telefonin ringir nógv, og fólk fregnast at vita, hvussu hon hevur tað.

Marjun sigur, at ræðslan, sum kom í hana, meðan hon sat í bilinum, ongantíð fekk takið á henni.

– Men jú, eg var ræðuliga bangin. Tað var ólekkurt at sita har einsamøll í bilinum, sigur hon og leggur afturat, at tað ber ikki til at greiða frá, hvussu og hvat ein hugsar í slíkari støðu.

– Eg dugi ikki at greiða frá tí. Men har var nú heldur ikki nógv annað hjá mær at gera enn at bíða. Eg slapp jú ongan veg, staðfestir hon.

Hon heldur fram, at tá hon rakti grótrúgvuna ljóðaði tað sum, at bilurin fór í knús. Men so var tó ikki. Tá hann um middagsleitið sunnudagin, varð tikin burtur frá staðnum, koyrdi hann. Men hann skal tó ein túr á verkstað, tí botnurin fekk eina harða viðferð.

Marjun sigur, at hon nú fyrst og fremst fer at royna at koma yvir hetta. Hon hevur tað eftir umstøðunum gott. Men skelkurin situr í henni, og hon sigur, at um hon framhaldandi fer at hava tað, sum hon hevði tað sunnukvøldið, so verður tað ikki stuttligt at koyra eftir Viðareiðisvegnum framyvir. Veturin liggur fyri framman, og ofta eru keðilig líkindi tá.

Sunnukvøldið svav Marjun í Klaksvík, tí hon vildi sleppa undan at koyra á Viðareiðisvegnum longu aftur mánamorgunin. Og gott tað sama, tí mánamorgunin regnaði í sama lag.

– Eg vóni ikki, at hetta heldur fram, tí eg má koyra eftir vegnum aftur. Eg kann ikki vera bangin fyri tí. Eg búgvi jú á Viðareiði og arbeiði í Klaksvík, sigur Marjun á Høvdanum Andreasen.

### Omanlop í Ekstrablaðnum

Ekstrablaðið skrivaði um skriðulopið á Viðareiðisvegnum í sunnudagsútgávuni hjá teimum.

– Skriðulop og yvirflóð hevur rakt partar av Føroyum eftir herviligt áarføri sunnunáttina. Hetta hevur serliga gjørt seg galdandi í teimum norðaru oyggjunum, har fleiri áir hava lopið.

Føroyingar mugu tó brynja seg við toli, tí veðurforsøgnin til mánadagin boðar frá nógvum regni og vindi, stóð skrivað í Ekstrablaðnum sunnudagin.

Tó var ikki talan um so grovt áarføri á Viðareiði mánamorgunin, so støðan var batnað munandi, sambært, vegaformanninum í norðoyggjum, Ernst Vágsgarð.

– Tað regnar sum skilst munandi verri í eitt nú Klaksvík í dag, segði hann tíðliga mánamorgunin júst sum teir vóru farnir í gongd við at rudda av vegnum aftur.

**- sae -**

### Vegurin opin aftur

Mánamorgunin klokkan sjey læt Viðareiðisvegurin upp aftur fyri ferðslu.

– Tað er nógv vatn á vegnum enn, og tvørrennurnar eru tiptar, sigur Ernst Vágsgarð, vegaformaður í norðoyggjum.

Hóast vegurin læt upp aftur mánamorgunin, so gjørdi Landsverk av ikki at loyva stórum bilum norðurum. Eitt nú koyrdi skúlabussurin ikki.

Annars sigur Ernst Vágsgarð, at fólk hava verið sera umhugsin hetta vikuskiftið, meðan áaførið hevur vart.

– Tey hava ikki koyrt nógv, og tá tey eru farin, hava tey sýnt størsta varsemi, sigur hann.

Mánamorgunin varð vegurin til Múla stongdur, tí har var eisini omanlop mánanáttina.

– Men tað verður so at bíða, til vit hava fingið bøtt um støðuna á Viðareiðisvegnum, sigur vegformaðurin í Norðoyggjum.

**- sae -**